# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 03. februar 2021 |
| Mál nr.: | 20/00026 |
| Málsviðgjørt: | |
| Eftirkannað: | 12. november 2020 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð**
(Minka landsbankanevndina, smidligari ásetingar um landsins gjaldføri, stovnsfæið avtikið)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 116 frá 24 november 2016 um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Nevndin er skipað við 3 limum og 3 varalimum, sum landsstýrismaðurin velur í eitt 3 ára tíðarskeið og kunnu veljast aftur í mesta lagi 4 ferðir. Tá limur ikki hevur sitið í nevndini í eitt 3 ára skeið, kann hann veljast av nýggjum. Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Felagið Føroyskir Peningastovnar, Búskapar- og løgfrøðingafelagið, Felagið Føroyskir Grannskoðarar, ella onnur, sum landsstýrismaðurin heitir á, kunnu koma við uppskotum til nevndarlimir"

**2.** § 2, stk. 4. verður strikað.
Stk. 5-7 verða eftir hetta stk. 4-6.

**3.** Í § 11 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Tá umræður afturrindan ella endurfígging av landskassaláni, kann víkjast frá kravinum í stk. 1 fram til at næsta landskassalánið fellur til gjaldingar. Í slíkum føri skal landsins gjaldføri tó ikki minka niðurum 13% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna árið."
Stk. 2-4 verða eftir hetta stk. 3-5.

**4.** § 17 verður strikað.

**5.** § 18, stk. 2 og 3 verða strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**
**1.1. Orsakir til uppskotið**

Orsøkin til at lógaruppskotið verður gjørt, er at dagføra lógtingslóg nr. 116 frá 24 novembur 2016 um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð.

Landsstýrismaðurin mælir til at:

- Landsbankanevndin verður minkað fyri at Landsbankin kann virka effektivari,
- Raksturin verður fíggjaður av landskassanum,
- Ásetingarnar í lógini um landsins gjaldføri verða smidligari,
- Stovnsfæ Landsbankans verður flutt til Búskapargrunnin

**Landsbankin**
Landsbankin virkar í dag eftir løgtingslóg nr. 116 frá 24. november 2016 um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð. Sambært § 1 er Landsbankin almennur fíggjarstovnur og greiningarstovnur, ið virkar fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum. Bankin er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini.

Landsbankin fyrisitur landsins gjaldføris- og skuldarviðurskifti eftir áseting frá nevndini. Almennir grunnar og kommunur kunnu sambært lógini brúka bankan. Bankin skal eisini gera fíggjarligar váðagreiningar.

**Landsbankanevndin**
Landsbanki Føroya er undir leiðslu av einari nevnd og einum stjóra. Nevndin er skipað við 7 limum og 7 varalimum, sum landsstýrismaðurin velur fyri eitt 3 ára tíðarskeið. Limirnir verða tilnevndir soleiðis at landsstýrismaðurin tilnevnir 2 nevndarlimir, Fróðskaparsetrið 2 limir, Arbeiðsgevarafelagið, Komunufelagið og fakfeløgini hvør sín nevndarlim. Somu aktørar tilnevna 7 varalimir.

Limirnir í nevndini skulu hava fakligar førleikar innan eitt ella fleiri av hesum førleikaøkjum: búskaparfrøði, fígging og kredittmeting, serligt innlit í føroyska fíggjargeiran ella búskapin í Føroyum. Nevndarlimirnir skulu samanlagt fevna um allar hesar førleikar.

Nevndin skipar seg við formanni og næstformanni. Setur stjóran og loysir stjóran úr starvi. Ger reglur fyri virksemi hjá nevnd og stjóra. Ásetingar fyri hvussu gjaldføri landsins og skuld landsins skal umsitast, og annað.

<u>Broytt nevnd</u>
Landsbankanevndin má metast at verða ov stór. Endamálið við hesum kann verða at tá tað eru fleiri partar (stovnar, feløg o.a.), sum tilnevna nevndarlimir, verður ymiskur serkunnleiki, áhugamál og sjónarmið umboðaði í nevndini.

Landsstýrismaðurin metir at ein trímanna nevnd kann arbeiða skynsamari og betri. Mannagongdirnar verða lættari og tað er skjótari at taka neyðugar avgerðir. Landsstýrismaðurin velur eina 3 manna nevnd.

Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Arbeiðsgevara Felag, Felagið Føroyskir Peningastovnar, Búskapar- og løgfrøðingarfelagið, Felagið Føroyskir Grannskoðarar ella onnur, sum landsstýrismaðurin heitir á, kunnu koma við uppskotum til nevndarlimir.

Til samanberingar kann nevnast, at tá Landsbankin varð avtikin í 2013, varð Gjaldsstovuráðið sett á stovn, sum hevði eftirlit við gjaldføri og skuld landskassans. Tað var skipað við 3 limum, sum landsstýrismaðurin tilnevndi fyri 4 ár í senn, eftir instilling frá BLF, Grannskoðarafelagnum og Advokatfelagnum. Gjaldstovuráðið var avtikið í 2015.

"Bústaðir" verður fyrisitið av einum stýri við trimum limum, ið landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tilnevnir fyri 4 ár í senn. "Realurin" verður stjórnaður av einari trímannastjórn, ið verður tilnevnd av landsstýrismanninum, fyri 5 ár. Eisini verður vald ein ráðgevandi umboðsnevndin við 8 limum. "Búskaparráðið" hevur 3 limir, sum landsstýrismaðurin setir eftir tilmæli frá Fróðskaparsetrinum.

Eftir lógini skal landsstýrismaðurin velja nevndina fyri Landsbankan av nýggjum, fyri næstu trý árini, tað vil siga fyri tíðarskeiðið 1. januar 2020 til 31. desembur 2022. Ætlanin er at nevndin verður vald av nýggjum tá lógarbroytingin er kunngjørd.

**Landsbankin, kostnaður og játtan**
Sum nú er, verður rakstur landsbankans fíggjaður við gjaldi upp til 4 promillu av minsta gjaldføri landsins í 2020. Rakstrarkostnaðurin er í miðal er 7,5 mió kr. (árini 2016 – 2019). Játtanin í ár er 9,2 mió kr. Rakstrarjáttanin er útreiðsluneutral.

Ætlanin er nú at Landsbankin verður stovnur við vanligari rakstrarjáttan á fíggjarlógini, har útreiðslurnar verða fíggjaðar beinleiðis av landskassanum.

Landsbankanevndin kostar góðar 600 tús kr. árliga (2018). Nevndarlimirnir fáa fasta mánaðarliga samsýning. Um nevndin verður lækkað til 3 limir, verður talan um sparing.

**Landsins gjaldføri, smidligari ásetingar**
Eftir § 11, stk 1 í lógini um Landsbankan, skal landsstýrismaðurin skipa soleiðis fyri, at landsins gjaldføri í minsta lagi svarar til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarnum ári.

Landsstýrismaðurin vil at ásetingin um gjaldføri landsins skal verða smidligari í sambandi við afturrindan ella endurfígging av landskassalánum, og at lógin tessvegna skal dagførast.

Lógin skal framhaldandi áseta, at gjaldførisminstakravið verður 15% av BTÚ í undanfarna ári. Lógin verður eftir ætlan broytt soleiðis, at møguleiki verður fyri, í sambandi við afturrindan ella umfígging av láni, í eitt styttri tíðarskeið, at víkja frá kravinum um 15% gjaldføri. Undantakið frá 15%-regluni kann einans verða galdandi fram til næsta lánið hjá landinum fellur til gjaldingar.

Tá støður taka seg upp, har landskassin hevur nærum nóg mikið av gjaldføri til at eitt lán kann afturgjaldast í einum, uttan endurfígging, skal møguleiki verða fyri tí. Annars kann landskassin verða noyddur til at taka smá lán í styttri tíðarskeið, ið kosta lutfalsliga nógv, og geva vánaligar lánitreytir. Landskassin eigur ikki at taka lán, ið ikki eru neyðug, og sum kosta landskassanum óneyðugar rentuútreiðslur.

Í 2019 er minstagjaldføri landsins ásett til 2,8 milliardir kr. Gjaldføri landsins er nú 4,9 mia kr.

**Stovnsfæ Landsbankans**
Eftir § 17. í lógini um Landsbankan, verður bankin stovnaður við 20 mió kr. í fæi, sum kann nýtast til at javna inntøkur og útreiðslur, í mun til virksemi landsbankans. Nevndin ger nærri reglur um hvat fæið kann brúkast til.

Eftir § 13 í sjálvum lógaruppskotinum, stk. 5, skuldi Landsbankin kunna veita lán til kommunur og almennar grunnar. Fíggjarnevndin strikaði stk 5. í lógaruppskotinum, tí nevndin helt ikki at tað var rætt at Landsbankin skuldi veita tílík lán.

Endamálið við fænum var at um Landsbankin veitti kommunum og grunnum lán, kundi gerast neyðugt hjá Landsbankanum at brúka fæið sum "buffara", til at javna inntøkur og útreiðslur, í mun til virksemi bankans.

Tað er ikki longur aktuelt, tí lán verða ikki latin. Nevnd landsbankans hevur ikki gjørt reglur fyri hvat stovnsfæið kann brúkast til, og er endamálið við fænum ikki ásett í lógini. Fæið stendur enn órørt, og verður mælt til at stovnsfæið uppá 20,0 mió kr. verður flutt til Búskapargrunnin. Landsbanki Føroya umsitur longu Búskapargrunnin.

Vísandi til hetta verður mælt til at strika § 17. í lógini um landsbankan.

## 1.2. Galdandi lóggáva
Galdandi lóggáva á økinum er løgtingslóg nr. 116 frá 24 novembur 2016, um Landsbanka Føroya og Føroya Váðaráð. Landsbanki Føroya er almennur fíggjarstovnur og greiningarstovnur, ið virkar fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum.

Landsbankin fyrisitur fyrst og fremst gjaldførisviðurskifti og skuldarviðurskifti landsins.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at dagføra lógina um Landsbanka Føroya. Sí niðanfyri.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Samanumtikið eru nýskipanirnar við uppskotinum hesar:

- Landsbankanevndina verður minkað frá 7 til 3 limir. Tað er lættari og skjótari hjá eini trímannanevnd, at taka neyðugar avgerðir.

- Landsbankin verður stovnur við vanligari rakstrarjáttan á fíggjarlógini, har útreiðslurnar verða fíggjaðar beinleiðis av landskassanum.

- Ásetingarnar í lógini um gjaldføri landsins uppá 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarnum ári, skulu verða smidligari í sambandi við afturrindan ella endurfígging av landskassalánum, soleiðis at landskassin kann sleppa undan at taka lán, ið ikki eru neyðug, og sum kosta landskassanum óneyðugar rentuútreiðslur.

- Stovnsfæ Landsbankans uppá 20 mió kr. hevur sum er onki endamál , og verður flutt til Búskapargrunninum.

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið verður sent til hoyringar hjá stovnum, feløgum og ráðum.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Rakstur landsbankans
Rakstur landsbankans verður fíggjaður við gjaldi upp til 4 promillu av minsta gjaldføri landsins í 2020. Rakstrarkostnaðurin er í miðal er 7,5 mió kr. (árini 2016 – 2019). Játtanin í ár er 9,2 mió kr. Rakstrarjáttanin er sum er útreiðslurneutral fyri landskassan

Landsbankin verður nú stovnur við vanligari rakstrarjáttan á fíggjarlógini, har útreiðslurnar verða fíggjaðar beinleiðis av landskassanum. Eftir ætlan verða uppgávurnar hjá Búskaparráðnum lagdar til Landsbankan. Rationaliseringar verða framdar í hesum sambandi, soleiðis at raksturin verður bíligari samanlagt.

Landsbankanevndin kostar góðar 600 tús kr. árliga (2018). Nevndarlimirnir fáa fasta mánaðarliga samsýning. Um nevndin verður lækkað til 3 limir, verður talan um sparing.

Uppgáva Búskaparráðsins er at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og koma við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina. Búskaparráðið ger árliga tvær konjunkturfrágreiðingar, men kann eisini gera temafrágreiðingar og ráðgeva landsstýrinum í øðrum málum.

Stovnsfæ grunsins
Landsbankin var stovnaður við 20 mió kr. í fæi, sum millum annað skuldi nýtast til at javna inntøkur og útreiðslur í mun til virksemi landsbankans, tá lán verða latin. Landsbankin hevur ikki heimild at veita lán. Sovnsfæið uppá 20,0 mió kr. stendur enn órørt, og verður flutt til Búskapargrunnin.

Landsins gjaldføri, smidligari ásetingar
Eftir § 11, stk 1 í lógini um Landsbankan, skal landsstýrismaðurin skipa soleiðis fyri, at landsins gjaldføri í minsta lagi svarar til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarnum ári.

Ásetingin um gjaldføri landsins skal verða smidligari í sambandi við afturrindan ella endurfígging av landskassalánum, soleiðis at møguleiki verður fyri, í sambandi við afturrindan ella umfígging av láni, í eitt styttri tíðarskeið, at víkja frá kravinum um 15% gjaldføri av bruttotjóðarúrtøkuni, tó ikki niðurum 13%. Undantakið frá 15%-regluni kann einans verða galdandi fram til næsta lánið hjá landinum fellur til gjaldingar.

Landskassin eigur ikki at taka lán, ið ikki eru neyðug, og sum kosta landskassanum óneyðugar rentuútreiðslur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur smávegis umsitingarligar avleiðingar fyri landið.

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar á tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið elvir ikki til marknaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommununum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**
Nr. 1. Eftir lógaruppskotinum verður § 2. stk. 2 í lógini um Landsbankan og Føroya Váðaráð broytt soleiðis, at landsbankanevndin verður lækkað frá 7 nevndarlimum til 3 nevndarlimir, sum landsstýrismaðurin velur. Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Arbeiðsgevara Felag, Felagið Føroyskir Peningastovnar, Búskapar- og løgfrøðingarfelagið, Felagið Føroyskir Grannskoðarar ella onnur, sum landsstýrismaðurin heitir á, kunnu koma við uppskotum til nevndarlimir.

Nr. 2. Eftir lógaruppskotinum verður § 2. stk 4 í lógini strikað, tí landsstýrismaðurin velur nevndina og roknast má við, at tey, sum eru vald hava førleikan, sum er ásettur í § 2, stk. 3.

Nr. 3. Eftir § 11 stk 1. skal landsins gjaldføri í minsta lagi svara til 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í farna fíggjarári. Í lógini verður sett inn, sum stk 2. at tá umræður afturrindan ella endurfígging av landskassaláni, kann víkjast frá kravinum í stk. 1, sum er at gjaldføri landskassans fram til at næsta landskassalánið fellur til gjaldingar. Í slíkum føri skal landsins gjaldføri tó ikki minka niðurum 13% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna árið.

Nr. 5 § 17. í lógini verður strikað. Landsbankin var stovnaður við 20 mió kr. í stovnsfæi. Endamálið var at kunna javna inntøkur og útreiðslur í mun til virksemi bankans. Grunnurin verður ikki brúktur, og er eingin áseting um virksemi grunsins, tí verður stovnsfæið latið Búskapargrunninum.

Eftir § 18. stk 2. verður rakstur Landsbankans fíggjaður við gjaldi upp til 4 promillu av minsta gjaldføri landsins í 2020. Nú Landsbankin skal fíggjast beinleiðis av landskassanum, verður ásetingin í stk 2 strikað. Eftir stk. 3 kann Landsbankin hava inntøkufíggjað virksemi. Hetta er longu heimilað í játtanarlóg, og verður ásetingin strikað.

**Til § 2**
Lógin kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd.

Fíggjarmálaráðið, 03. februar 2021

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: